# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 24. januar 2019
Mál nr.: 19/00003
Málsviðgjørt: HKV
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tollsatsir (Toll og vøruskráin)**(Ljóðbøkur gerast avgjaldsfríar eins og aðrar bøkur)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tollsatsir (Toll- og vøruskráin)

(Ljóðbøkur gerast avgjaldsfríar eins og aðrar bøkur)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2015 um tollsatsir, sum broytt við løgtingslóg nr. 33. frá 15. apríl 2016, løgtingslóg nr. 41 frá 10. apríl 2017, og løgtingslóg nr. 18 frá 15. mars 2018, verður gjørd henda broyting:

Skjal 1 til løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2015 um tollsatsir verður broytt sum ásett í skjali 1 til hesa løgtingslóg.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Skjal 1**

**Í Toll- og vøruskránni verða hesi vørunummur sett inn:**

| Vørunr. | Gatt | Tekstur |
|---|---|---|
| 85234915 | 0 | Lydbøger |

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Orsøkin til uppskotið er, at landsstýriskvinnan hevur avgjørt, at ljóðbøkur skulu gerast mvg-fríar, og harvið javnsettar við vanligar prentaðar bøkur. Fyri at umsita avgjaldsfrítøkuna krevst, at ljóðbøkur fáa sítt egna vørunummar í Toll- og vøruskránni. Við hesum uppskotinum fáa ljóðbøkur sítt egna vørunummar.

Verður uppskotið samtykt er ætlanin at broyta *Kunngerð nr. 22 frá 19. februar 2003 um meirvirðisgjaldsskylduga sølu av bókum* soleiðis, at vørunummarið hjá ljóðbókum verður umfatað av kunngerðini, og ljóðbøkur sostatt gerast mvg-fríar eins og aðrar bøkur.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi Toll- og vøruskrá hava ljóðbøkur ikki sítt egna vørunummar, men eru bólkaðar saman við øðrum elektroniskum ella digitalum ljóðmiðlum alt eftir hvat slag av útbúnaði talan er um, sum t.d. fløgur, geymar o.s.fr.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at geva ljóðbókum egið vørunummar, soleiðis at hesar kunnu eyðmerkjast og gerast avgjaldsfríar.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at ljóðbøkur fáa egið vørunummar í Toll- og vøruskránni.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Vinnuhúsinum
- Mentamálaráðnum
- TAKS
- Landsbókasavninum (Ljóðbókatænastan)
- MEGD

Eisini hevur uppskotið ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur – í sær sjálvum – ongar fíggjarligar avleiðingar. Talan er einans um at ljóðbøkur fáa egið vørunummar.

Gatt-tollurin á ljóðbókum verður í uppskotinum settur til 0%. Men tey vørunummur, sum ljóðbøkur í dag eru fevnd av rinda ikki Gatt-toll, so uppskotið hevur ikki við sær minni inntøkur av tolli.

Men í næsta umfarið er ætlanin at broyta *Kunngerð nr. 22 frá 19. februar 2003 um meirvirðisgjaldsskylduga sølu av bókum* soleiðis, at vørunummarið hjá ljóðbókum verður umfatað av kunngerðini, og ljóðbøkur sostatt gerast mvg-fríar eins og aðrar bøkur. Hetta fer at kosta landinum eina lítla upphædd í mvg-inntøkum. Roknað verður tó ikki við meir enn nøkrum fáum túsund krónum árliga.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fyristitingarligar avleiðingar fyri TAKS, sum nú skal skilja í millum ljóðbøkur og aðrar ljóðmiðlar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur – í sær sjálvum – ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Men uppskotið er liður í at gera ljóðbøkur avgjaldsfríar og hevur harvið jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri tey, sum vegna at tey eru sjónveik ella líknandi keypa sær ljóðbøkur.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið áleggur ikki revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið áleggur ikki gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Nýtt vørunummar verður innsett í skjal 1 í lógini. Ljóðbøkur fáa vørunummar 85234915 og Gatttollurin verður settur til 0%.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 24. januar 2019.

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason